## Sjómenn tryggari

Tilbúgvingarstovnurin hevur gjørt avtalu við eina fyritøku í Eysturríki um at útbyggja VHF-netið millum oyggjarnar og at seta upp eina sokallaða AIS-skipan, sum kann fylgja við skipaferðsluni. Tað fer at kosta níggju mió. krónur at útbyggja VHF-netið, og útbyggingin fer at bøta um hoyrilíkindini millum oyggjarnar. Herumframt hevur Tilbúgvingarstovnurinm keypt eina útkalliskipan til sløkkiliðini, sum alarmsentralurin skal brúka.

# m av fullum huga




*Línuskipini hava vánaligan fiskiskap undir Føroyum í løtuni, og tí er ivasamt, um tað yvirhøvur loysir seg hjá teimum at sigla av landinum við veiðini. Í dag loysti Ågot í klaksvík, so tað eru hóast alt teir, sum trúgva upp á, at okkurt fer at bera til hjá línuskipunum eisini*

*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

hjá hesum bátum at sigla av landinum við veiðini.

Hann væntar, at tað í longdini loysir seg betur hjá línuskipunum at goyma fiskidagarnar, til fiskiskapurin verður betur.

- Onkur línuskip kunnu fara til Íslands at royna, men verður óvissa, um tey sleppa av við fiskin, er hesin møguleikin kanska heldur ikki so áhugaverdur í einum møguligum verkfalli, sigur Jan.

> *»Tey, sum starvast á fiskavirkjunum, eru okkara »ekspertar« á sínum øki – og ikki ófaklærd, sum arbeiðsgevarin vil gera tey til…«*
>
> *(Jan Højgaard)*

### Langt afturút

Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag skilir væl, at tey, sum umboða arbeiðarafeløgini, vilja vinna sínum limum betri lønarkor.

- Tað er eingin loyna, at arbeiðarin er langt afturút sigldur í løn, og eg haldi, at myndugleikarnir eisini áttu at tikið hædd fyri, at føroyski arbeiðarin skjótt kann gerast so nógv afturút sigldur lønarliga, at hesin næstan verður ein »annað klassa borgari«, sum hann tekur til. Eg haldi tað vera harmiligt, at soleiðis skal vera vorðið í Føroyum í 2007.

Jan vísir á, at reallønin hjá arbeiðarum er afturút sigld í mun til lønirnar hjá teimum alment løntu.

- Hvørjum hava vit meira brúk fyri – teimum, sum bera í landskassan ella teimum, sum taka úr honum? spyr formaðurin í Fiskimannafelagnum.

Hann leggur dent á, at tað eru fiskimaðurin og arbeiðarin, sum lyftu samfelagið upp úr aftur djúpu kreppuni í nítiárunum.

- Eg haldi virkuliga, at arbeiðarafjøldin í Føroyum hevur uppiborið betri lønarkor, enn hon hevur í dag. Tey, sum starvast á fiskavirkjunum, eru okkara »ekspertar« á sínum øki – og ikki ófaklærd, sum arbeiðsgevarin vil gera tey til, sigur Jan Højgaard.


## Pedagogar og hjálparfólk til Vípuna

Sjálvsognarstovnurin Vípan søkir eftir 2 pedagogum 30 tímar og 1 hjálparfólkið 25 tímar, til at byrja 15. august 2007 ella eftir nærri avtalu.

Vípan er ein barnagarður við børnum frá 3-7 ár. Eftir summarfrítíðina fer Vípan at taka ímóti børnum frá 2-8 ár. Tað er fyrsta árið, Vípan fer at taka í móti frítíðarskúlabørnum og vøggustovubørnum.

Arbeiðstíðinar eru skiftandi, frá 7.30-17.00.

**Vit bjóða eitt áhugavert starv:**
- hvar náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum og hvar spæl fyllir nógv
- hvar virðing og trivnaður hjá barninum er í hásætið
- opinleika og ein jaligan hugburð fyri framtíðini
- við broytingum hvar tú hevur tína ávirkan

**Vit vænta av tær:**
- At tú ert útbúgvin pedagogur
- Hevur royndir og fagliga vitan
- At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- At tú ert opin fyri broytingum
- At tú hevur góð samstarvsevnir yvir fyri børnum, foreldrum og starvsfelagum
- At tú sært fyrimunir fram um vansar

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Eyð Skúvadal, leiðara á tlf 317535/ 287535

Umsókn saman við avrit av prógvum og viðmælum, skal vera stovninum í hendi, seinasta lagi 27. maj 2007.05.10

**Vípan**
Vípuvegur 3
100 Tórshavn
Tlf. 317535/ 287535

## Seksaringur til sølu

**Ein stórur seksaringur í sera góðum standi bíliga til sølu.**

**Minni bátur kann ganga inn í keypið.**

**Áhugaði kunnu ringja 44 12 25 ella 27 30 97**

## Leyst starv

### Starv sum happadráttarseljari í Havn er leyst at søkja

Setanin er galdandi frá 1. juli 2007 at rokna.

Skrivlig umsókn verður at senda nevndini fyri Happadráttin sum skjótast og í seinasta lagi 25. mai 2007.

**Nevndin fyri**
**Hin Føroyska Happadráttin**
**Árgeil 21 · 100 Tórshavn**